# Gera spennandi roynd á Tvøroyri



*Fagraberg og Fiskavirking á Tvøroyri eru farin undir eina roynd, sum tey eru ógvuliga spent upp á. Gongst væl, kann tað kasta rættiliga nógv arbeiði av sær á Fiskavirking á Tvøroyri*

**Í dag tekur Fiskavirking á Tvøroyri ímóti eini stórari last av smáum kongafiski úr altjóða sjógvi. Hetta hava tey ongantíð roynt áður, men eydnast tað væl, kann tað fáa stóran týdning fyri virkið og arbeiðsfólkið. Og tá ið teir fyrstu kassarnir vóru fingnir inn á virkið, var virkisleiðarin bjartskygdur**

**FISKIVINNUROYND**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit vita ikki, hvat vit eru farin í holt við, men eydnast tað, kann tað verða til nakað stórt.

John Nielsen, virkisleiðari hjá Føroya Fiskavirking í Suðuroy er ómetaliga spentur upp á eina nýggja roynd, sum Fiskavirking er fór undir í morgun.

Royndin verður gjørd í samstarvi við Framherja á Toftum.

Í hesum sambandi kom risastóri Fagraberg á Tvøroyri í morgun við eini stórari last av kongafiski.

Tey, sum ikki komast við navnið Fagraberg beinanvegin, minnast, at hetta er skipið, sum fyrr nevndist Krúnborg.

Hetta er eitt skip, sum altíð hevur fiskað sild, makrel, svartkjaft o.s.fr..

Men hendan seinasta túrin hevur Fagraberg fiskað eftir kongafiski í altjóða sjógvi norðanfyri Føroyar.

At Fagraberg nú eisini er farin at fiska kongafisk, er ein spennandi roynd í sær sjálvum og tað er ikki minni spennandi at fáa eitt so stórt skip inn á Tvøroyri, fullfermt av fiski.

Til stuttleika kann nevnast, at hann hevur fiskað í akkurát hesum økinum norðanfyri, sum Føroyar, Ísland og Noreg mikudagin skrivaðu avtalu um at býta ímillum hesi trý londini.

Og fiskiskapurin hevur hepnast væl tí tá ið Fagraberg kom á Tvøroyri høvdu teir 180 tons av kongafiski í lastini og tey hevur Fiskavirking gjørt klárt at taka ímóti.

### Vita ikki rættiliga

Men tað, sum virkisleiðarin hjá Fiskavirking er so spentur uppá, er, hvussu tað fer at eydnast at virka hendan fiskin.

– Vit vita í veruleikanum ikki rættiliga, hvat tað er, vit hava keypt. Vit vita, at talan er um kongafisk. Vit vita, at hann líkist kongafiski í Irmingarhavi og vit vita, at hann er smáur, sigur John Nielsen.

Og, tað, sum verður avbjóðingin hjá Fiskavirking, er at vita, um tað ikki ber til at fáa lønandi vinnu burturúr.

Men av tí, at teir ikki vita, hvussu tað gongst at virka fiskin, eru teir heldur ikki heilt greiður yvir, hvat Fagraberg fær fyri lastina.

– Tað er torført at siga enn, tí vit vita ikki, hvat fæst burturúr, sigur John Nielsen.

Á Fiskavirking á Tvøroyri er ætlanin at skera hann til flak og saga hann í blokk.

Blokkurin verður so førdur til Havnar, har hann skal sagast upp til útflutnings.

Og til hetta arbeiði, er ætlanin at fáa alla manningina hjá Fiskavirking á Tvøroyri til arbeiðis hesa lastina.

Ætlanin er at arbeiða í trýskiftisvaktum, allan sólarringin runt og tilsamans verða tey eini 80-100 fólk til arbeiðis

Væntandi fer tað at taka alla næstu viku at arbeiða allan fiskin.

Men John Nielsen væntar ikki, at tey klára at arbeiða alt undan á Tvøroyri og tí verður helst neyðugt at føra ein part av kongafiskinum til Havnar til virkingar.

### Kann fáa stóran týdning

Hann sigur, at hepnast hendan royndin væl, kann hetta fáa stóran týdning.

– Hetta er ein roynd, vit gera saman við reiðaranum. Og eydnast royndin væl, eru vit til reiðar at taka ímóti meiri av hesum kongafiskinum á Fiskavirking og tað kann fáa stóran týdning fyri virkið á Tvøroyri og arbeiðsfólkið her.

Tá ið teir fyrstu kassarnir vóru komnir í land og inn á virkið, var hann bjartskygdur og hann hevði góðar vónir um, at tað fer at bera til at fáa lønandi vinnu burturúr.

Stóri spurningurin verður helst um tað ber til at fáa so nógv burturúr, at eisini Fagraberg fær nøktandi prís fyri fiskin, men tað vita tey so ikki enn.



*Bjarni Hansen á Fiskavirking á Tvøroyri við tveimum kongafiskum av Fagraberg. Fiskurin er smáur og nú verður bíðað í spenningi eftir um tað ber til at virka hann so, at bæði virki og skip fáa nøktandi úrtøku*


FAROE SEAFOOD



BÓKHALDARI

Søkt verður eftir einum bókhaldara, at byrja sum skjótast.

Persónurin vit leita eftir, hevur hóskandi útbúgving sum t.d. skrivstovuútbugving ella líknandi. Arbeiðsroyndir við bókhaldsskipanina Axapta er ein fyrimunur.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Løn sambært avtalu

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jens Paula á telefon 594001

Umsóknarfreistin er 29. september.

P/F FAROE SEAFOOD TÓRSHAVN
VESTARA BRYGGJA · FO-100 TÓRSHAVN
TLF. 355555 · TELEFAX 312631



Verkfrøðingur

Nú nýbygningsvirksemið er økt, søkja vit eftir verkfrøðingi til teknistovuna á Tórshavnar Skipasmiðju.

Teknistovan er mannað við skips- og maskinverkfrøðingum umframt tekniskum teknarum og húsast, við sínum 12 starvsfólkum, bæði á Skálafjørðinum og í Havn.

Ert tú skips- ella maskinverkfrøðingur og kanska eisini útbúgvin sum skipsførari ella maskinmeistari, ert tú allarhelst tann, vit sóknast eftir.

Arbeiðsuppgávur tínar verða í høvuðsheitum:
- at tekna skipstekniskar tekningar (maskin og/ella stál) í forritinum Inventor/Autocad
- at gera skiptekniskar útrokningar, so sum stabilitets- og styrkisútrokningar
- at samskifta við Skipaeftirlit/ klassa, veitarar og kundar
- at leggja til rættis og leiða verkætlanir.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju
Postboks 65
FO-110 Tórshavn
Stílað: Thormund Johannesen, tekniskur leiðari,

og verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. oktober 2006.

Nærri upplýsingar fáast hjá Thormundi Johannesen, telefon +298 501 131 ella thormund.johannesen@faroeyard.fo

SKIPASMIÐJAN

Tórshavnar Skipasmiðja
J.C. Svabosgøta 31
Postboks 65
110 Tórshavn

Tel +298 30 11 00
Fax +298 30 11 01
info@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

*Á P/F Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 300 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fevna um stál, aluminium, timbur, máling, beding, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving og beinleiðis søla. Skipasmiðjan hevur deildir í Tórshavn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*